# Aðalfundur hjá Kollafjarðar Arbeiðarafelag

Ársaðalfundur Kollafjarðar Arbeiðarafelags verður hósdagin 28. februar kl. 19.00 í hølum felagsins.

**Dagsskráin fyri aðalfundin er:**

1. Val av fundarstjóra
2. Frágreiðing formansins um virki felagsins í farna ári
3. Framløga av roknskapi
4. Val av nevnd
5. Møgulig innkomin uppskot
6. Ymiskt

Umboð frá Føroya Arbeiðarafelag vera við á fundinum, at greiða frá trygging og eftirlønarskipanini.

Uppskot til viðgerðar á aðalfundinum skulu vera formanninum skrivliga í hendi í seinasta lagi 18. februar

**Kollafjarðar Arbeiðarafelag**

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir einum stuðulsfólki til 6 ára gamalt barn við serligum tørvi í Vágs kommunu at byrja 15. mars 2008 ella so skjótt sum gjørligt og fyribils fram til summarfrítíðina.

Stuðulin kemur í samstarvi við Frítíðarskúlan í Vági Sosiala deild, NSR tænastuna í Suðuroy og familjuna, at stuðla barninum í at fáa ein innihaldsríkan og mennandi dag.

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur hóskandi útbúgving og royndir.

Arbeiðið er 15 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Hevur tú spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, sosialdeildarleiðara á tlf. 37 36 04.

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosiala deild hjá Porkeris – og Vágs Kommunu í seinasta lagi 3. mars 2008 kl.12.00.

**Sosiala Deild**
**Porkeris- og Vágs Kommuna**
Við Á 8 · 950 Porkeri
Tlf 37 36 04 · Tlf 22 67 04
T-post: sosialadeild@email.fo

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
E-mail: ssh@ssh.fo

# Sjúkrarøktarfrøðingur

Vegna farloyvi verður søkt eftir avloysara fyri sjúkrarøktarfrøðing til sjúklingadeildina í tíðini

**15. mars til 31. oktobur 2008.**

Starvið er á 0,7 tíð við øllum vaktum

**Setanartreytir:**
Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sonny Ellendersen, deildarleiðara tlf. 34 33 00 ella fyristøðukvinnuna tlf. 34 33 00 lok. 3215.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og autorisatión skal sendast til:

Suðuroyar Sjúkrahús
Umsjónarmannin
Sjúkrahúsbrekkan 19
800 Tvøroyri

ella

ssh@ssh.fo

**Umsóknarfreist 12. mars 2008**

**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**

## Skeið á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum:

# ÚTBÚGVING AV KLINISKUM VEGLEIÐARUM

Nýtt skeið byrjar í september 2008 og endar í juni 2009.

Útbúgvingin fevnir um 1/6 ársverk, sum svarar til 9 ECTS (European Credit Transfer System) og verður boðin út í 7 modulum.

Modulini liggja í vikunum 38, 43 og 47 í 2008 og 7, 11, 17 og 20 í 2009. Vika 20 er verkætlanarvika, og próvtøkuuppgávan skal latast inn í 23. viku.

Skeiðið er tvørfakligt og kann søkjast av fólki við hægri útbúgving innan heilsuverkið sum t.d. sjúkrarøktarfrøðingum, fysioterapeutum, ergoterapeutum og øðrum.

Hjá sjúkrarøktarfrøðingum er skeiðið ókeypis. Hjá øðrum er kostnaðurin 16.000 kr.

Lýsing av skeiðnum og tilmeldingarblað fæst við at venda sær til skúlan, tlf. 352250 ella við at fara inn á heimasíðuna: www.srfs.fo

Tilmeldingarfreistin er: 15. apríl 2008 kl. 15:00.

**SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA**
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo




# Umboðsráðsval

Sambært § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til val hósdagin 27. mars 2008.

4 umboð í Tórshavnar valdømi eru uppá val.

Uppskot til umboð skulu skrivliga verða sjúkrakassanum í hendi ikki seinni enn 13. mars 2008

**HAVNAR SJÚKRAKASSI**
Tórshavn 25. februar 2008



# Eigaraíbúð í hjartanum í Havnini til sølu

Sera snotilig eigaraíbúð í nýbygningi í M. Heinasonargøtu 13, Tórshavn, til sølu.

Íbúðin sum er á 1. hædd, er 54 m² til víddar og liggur í fjálgum og veðurgóðum umhvørvi mitt í Havnini.

Vælhóskandi til einstakling ella 2 persónar og fevnir búrúmið um køk og uppihaldsrúm í einum, umframt sovikamar og wc/brúsurúm. Herumfram er felags trappuuppgongd, 21 m² og vaskirúm til víddar 15 m².

**Advokatarnir Hentze**

**DEMMUS HENTZE** landsrættarsakførari
**TURIÐ DEBES HENTZE** advokatur og mediator m.m.c.r.

Tórsgøta 17 · Postboks 236 · FR 110 Tórshavn
Tlf. 311460 · Telefaks 311490 · E-mail: hentze@hentze.fo
**www. hentze.fo**